

betri
DEILDIN

# DYSTARSKRÁ

## 7. UMFAR 30/04/2023

# B36 v KÍ

#VITERUB36

Joma®
ANDY ROBSON TIPS
J&K PETERSEN

J&K

J&K PETERSEN
www.jkp.fo


MAGN KAFFI
Føroyar
MAGN KAFFI
NÝMALID · VISTFRØÐILIGT
magn
MAGN KAFFI
Føroyar
MAGN KAFFI
NÝMALID · VISTFRØÐILIGT
magn




FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36
FC Tórshavn

Gundadalur, Postboks 1136
FO-110 Tórshavn, Føroyar
tel. +298 311936, fax +298 318036
b36@b36.fo

Kontonummar (Limagjald og stuðul):
9181 495.136.2 í Betri Banka

**www.b36.fo**

## B36 DYSTARSKRÁ

**Ábyrgd:** B36

**Myndir:** Bjarni Enghamar, Álvur Haraldsen, Sverri Egholm og onnur

FAROE SOCCER.com

TEL
20 59 59

uno
eitt og alt

- Hvítvørur
- Køkar
- Baðirúmsmøblar
- Súkklur
- Skápsloysnir
- Brúsukabinur
- Vesikummur

ODDAGREIN

# ODDA BRAK

**Við einum einstøkum undantaki hevur tað gingið framúr hjá okkara monnum fyrstu umførini.**

**Fimm av seks sigrum** hava sent okkum upp á annaðplássið á stigatalvuni, har tað bert er KÍ, sum er framman fyri okkum. Við øðrum er talan um oddadyst í dag, har tað eru tey bæði bestu fótbóltsliðini í landinum, sum skulu takast.

Tað skuldi borgað fyri góðsku, og tað skuldi borgað fyri undirhaldi. Fjeppararnir hjá feløgunum báðum duga hvør í sínum lagi at lita karmarnir kring ein fótbóltsdyst ávíkavist hvítar og bláar, og á vøllinum hava báðir partar víst, at í rætta lagnum verður talan enntá um sera undirhaldandi spæl.

Og so skulu vit altso ikki meira enn góða viku aftur fyri at finna prógv um, at KÍ væl og virðiliga kann takast. Í steypakappingini fingu vit truplast hugsandi lutakastið, men tað sama kann helst sigast um gestirnar, og bæði á og uttan fyri vøllin vístu vit bæði



el | net
Tel 60 00 60

Sjóbusiness
Góð sambond síðan 1919

faroeship.fo
FAROE SHIP

*... framhald frá síðu 9*




klaksvíkingum og føroyingum, at í Hvítadali eru tað vit, sum ráða.

Latið tann partin vera tann sama aftur í dag!

**#viterub36**

Marita Debess Magnussen

**Forkvinna í B36**

Jolly

# Bílegg títt kort her

betri.fo/fjepparakort



Vitja handil okkara á Hjalla



Her fært tú alt til vask og reingerð á einum stað

KEMILUX

FAROE AGENCY

www.faroeagency.fo

# KRÚTSTERKIR FAVORITTAR



**Tað er einki at taka seg aftur í, at KÍ tey seinastu árini hevur ment seg til størsta maktfaktorin í føroyskum fótbólti.**

**Trý meistaraheiti í** fýra ár tosa sítt týðiliga mál, og ikki minst var árið í fjør av slíkum slag, at føroyski fótbóltsfjepparin hugsaði, um tað yvir høvur gav nakra


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!

*... framhald frá síðu 13*

meining at kappast um eitt meistaraheiti, sum í denn grad tóktist vera avgjørt, longu áðrenn tað byrjaði.

**Manningin á liðnum** er krútsterk. Hon telur ikki so nógvar klaksvíkingar, men hinvegin eru teir, sum eru har, sera stinnir. Av føroyskum keyptum spælarum eru mest sum einvíst spælarar í landsliðsflokki, og tá tú reksar upp nøvn sum Odmar Færø, Heina Vatnsdal, René Shaki Joensen, Árna Frederiksberg og nú eisini Hallur Hansson, so er tað altso toppurin av heimligum fótbólti, sum vit tosa um.

**Og tá alt** hetta at enda verður supplerað við sterkum útlendskum spælarum hevur tú í mangar mátar ein hóp, sum hevur tveir klassaspælarar til hvørt tað einasta pláss, og sum í mun til allar kappingarneytan kann mynsta kvalitet á øllum plássum,




# FYRSTA FLOKS FLAK BEINLEIÐIS ÚR HAVINUM

## P/F ENNIBERG

*... framhald frá síðu 17*




nærum líkamikið, hvør skaðastøðan í hópinum er.

**Men so skulu** vit leggja afturat, at heilt ónertiligir eru teir ikki. Víkingur prógvaði í seinasta dystinum í fjør – altso steypafinaluni – at KÍ kundi koppast, og tað sama prógvaðu vit eisini seinasta leygardag, tá KÍ mátti ásanna, at tað

heldur ikki verður í ár, at tey bláu skulu droyma um nakra greipu.

**Skal tað sama** eydnast okkum í dag, so er eingin ivi um, at vit skulu brúka somu uppskrift. Væl skipaðir í øllum røðum, soleiðis at vit eru til reiðar at leggja trýst á í røttu løtu. Men fram um alt skulu vit vera djarvir og tora at spæla fótbólt. Tann parturin plagar at hanga neyvt saman við góðum sjálvsáliti, og soleiðis sum vit hava sæð liðið spælt seinastu vikurnar, skuldi eingin ivi verið um, at sjálvsálitið hjá monnum er á eini heilt góðari leið.

**Rennið dreingir!**

# ER BÁTURIN KLÁRUR?

**VITJIÐ SØLUBÚÐ OKKARA!**

- Máling (Hempel)
- Zinkklossar
- Reinsi- og vaskievni (Hempel)
- Penslar og tilfar

**Taka bátin upp ella sjóseta?**
**Ring til MEST á tlf 301100**

MEST P/F
J.C. Svabosgøta 31
P.O.BOX 65
FO-110 Tórshavn

tel:+298 301100
fax:+298 301101
info@mest.fo
www.mest.fo






KE BUSSKOYRING

*...Vit hava altíð ein buss*

***Ring***
***210165***



# GLIÐ KOM Á HJÁ KVINNUNUM

Eftir eina trupla byrjan, har vit spældu javnt móti Víkingi og taptu í Klaksvík, fingu kvinnurnar sín fyrsta




# B36-HÚSIÐ ER VÆL ÚTGJØRT TIL FLEST ØLL TILTØK

Umleið 180 fólk sita væl til borðs í senn í tí stóra salinum.
Køkurin er væl útgjørdur við øllum hentleikum.
Leigukostnaðurin er kr. 9.000,- fyri eitt kvøld.

* Eykagjald fyri reingerð er kr. 1.500,-

Tosa við B36 fyrst, tí so er óneyðugt at tosa meir !

Ring til Angeleen á **252040**

**www.b36.fo**

*... framhald frá síðu 20*

sigur í ár, tá EB/Streymur/Skála vitjaði farna sunnudag.

Úrslitið av dystinum gjørdist 4-0, og alt varð avgjørt fyrstu tíggju minuttirnar, tá vit løgdu okkum á odda við málum frá Olgu Kristinu og Elsu Splidt. Málið hjá Olgu Kristinu var eisini hennara mál nummar 100 í Betri-deildini, so tað skuldi sjálvandi feirast.

Elsa økti eisini til 3-0 stutt efti steðgin, áðrenn Livyan setti punktum við málinum til 4-0.

Samstundis stóð tað okkum greitt, at hetta var seinasti dysturin, har Tummas Erling Djurhuus (TED millum vinir) hevði leiðsluna av kvinnuliðnum.

Boð hava verið eftir honum í heimbygdini, har TB skuldi hava nýggjan venjara, og teirri avbjóðingini hevur fryntligi suðuroyingurin valt at taka av.

Fyri okkum er tað spell at missa ein somikið dugnaligan og eldhugaðan venjara, men vit skulu samstundis nýta høvið til at ynskja Tummas Erlingi bestu eydnu á víðari leiðini. Og hann kann vera púrasta vísur í, at har standa í minsta lagi hálvonnur hurð á glopp, skuldi hann fingið hug at komið aftur til Gundadal og B36.

Leygardagin spældu kvinnurnar aftur. Hesa ferð á útivølli móti 07 Vestur. Úrslitið av tí dystinum var ókent, tá hesar reglur vórðu skrivaðar.

ANDY ROBSON
TIPS



TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

# TVEIR Á U17-LANDSLIÐIÐ




Frá 30. apríl til 8. mai verður menningarkapping fyri U17 landslið í Moldova. Umframt vertstjóðina eru Aserbadjan, Albania og Føroyar við í kappingini.

*... framhald frá síðu 25*

Tá talan er um menningarkapping, er talan um spælarar, sum hava aldur at spæla U17-fótbólt næsta ár, og Fróði Benjaminsen, landsliðsvenjari, hevur valt sær 18 spælarar at hava við á ferðini.



Millum hesar eru tveir úr B36. Nevnliga Sebastian Gullfoss og Bogi Jógvansson Christiansen. Sebastian er stinnur verjuleikari, meðan Bogi ger um seg á framrættaða miðvøllinum.

Báðir hava teir alla sína fótbóltsuppaling í B36, og vit gleða okkum at síggja meira til góðu fótbóltsevnini í komandi árum.

Teimum og restina av føroyska hópinum verður ynskt eina góða og gevandi kapping.


BYGMA
BALSLEV
STOLTIR LIÐSPÆLARAR
HJÁ B36
Bygma Balslev - Vegurin Langi - Tel. 345000 - balslev.fo

# Hví eiga, tá ið **tú kanst leiga?**







HÜNNEBECK

- borgar fyri góðsku

Kaj Andreasen & Co

Tit hava tørvin - vit eru veitarin




DPR
SNIKKARAVIRKIÐ

Akranesgøta 4 Tórshavn tel. 317082 **www.dpr.fo**







Skraddaraseymaðar loysnir

## Veitari til føroysku vinnuna

Hjá Solar menna vit áhaldandi vørur og tænastur. Hetta optimerar bæði arbeiðsgongdina hjá viðskiftafólki okkara og okkara samskifti við viðskiftafólkið. Vit hava gjørt okkum royndir líka síðan fyritøkan varð grundað í 1919, og hava tí havt góða tíð at menna eitt framúrskarandi úrval av vørum og tænastum.

Vit læra av viðskiftafólki okkara, og í tøttum samstarvi menna vit støðugt teir førleikar, sum vit longu hava. Vit bjóða meira enn bara eina vøru, av tí at vit fara inn í eitt tætt samstarv við kundan fyri at hjálpa at optimera arbeiðsgongdina.

Ring 35 79 33 og hoyr nærri

Solar Føroyar P/F   Brekkutún 2   Hoyvík   tel. 35 79 33   solar@solar.fo   www.solar.fo

THETIS

Timbur- & snikkaraarbeiði



Vit átaka okkum alt arbeiði innan fyri bygging, umbygging og umvæling.

DygdarVerk

v/Jens Kristian Hansen, Bygningssnikkari • Tel. 56 30 30 • dygdarverk@gmail.com

SAFARI
TRANSPORT

TEL 32 22 22

DØGNVAKT 22 22 22

FLOGFRAKT
SJÓFRAKT
SKUNDFRAKT
FLYTIGÓÐS
VANDAMIKIL EVNI
LÍK
DJÓR
LAGUR-HOTELL
AVTALU-FRAKT
TOLL-AVGREIÐSLA

SAFARI GER LÍVIÐ LÆTTARI

Nomi
Smykkur & Ur

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI


Alt innan grill til summarhugnan
weber
Fønix
Mykinesgøta 8 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 19 09 • www.fonix.fo


SANSIR
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
HOTEL BRANDAN
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

**VITJANDI LIÐIÐ**

# KÍ

**1** Markus Olsen **PETERSEN** (M)
**2** Patgrik **DA SILVA**
**4** Veggard **FORREN**
**5** Deni **PAVLOVIC**
**6** Mads Boe **MIKKELSEN**
**7** Árni **FREDERIKSBERG**
**8** Jákup B. **ANDREASEN**
**9** Páll A. **KLETTSKARÐ**
**10** Luc **KASSI**
**11** John **JOHANNESSEN**
**12** Sivert **GUSSIÅS**
**14** René Shaki **JOENSEN**
**15** Símiun **KALSØ**
**16** Hannis **MATRAS**
**17** Jóannes K. **DANIELSEN**
**18** Olaf K. **HANSEN**
**19** Dávid B. **ANDREASEN**
**20** Børge **PETERSEN**
**21** Rói Mørk **HENTZE**
**22** Oddmar **FÆRØ**
**23** Heini **VATNSDAL**
**24** Silas **GAARD**
**25** Óli **EYÐSTEINSSON**
**29** Jákup N. **VILHELMSEN**
**32** Claes Philip **KRONBERG**

**Venjari** Magne Hoseth
**Hjálparvenjarar** Daniel Berg Hestad og Sjúrður Jacobsen

HVÍTTKLÆDDA HEIMALIÐIÐ

# B36 TÓRSHAVN

1 Mattias **LAMHAUGE** (M)
2 Andrias **H. ERIKSEN**
3 Jann Julian **BENJAMINSEN**
4 Ísak **JONSSON**
5 Sonni Ragnar **NATTESTAD**
6 Eli **FALKVARD NIELSEN**
7 Bjarki **C. NIELSEN**
8 Taufee **SKANDARI**
9 Hannes **AGNARSSON**
10 Valerijs **SABALA**
11 Benjamin **HEINESEN**
12 Mattias **J. HELLISDAL**
13 Emil **WEIHE JOENSEN**
14 Rani **Í SOYLU**
16 Magnus **EGILSSON**
17 Mattias **WEIHE JOENSEN**
19 Erlendur **MAGNUSSON**
20 Andrass **JOHANSEN**
22 Símun **SÓLHEIM**
23 Carl **MIKKELSEN**
25 Silas **EYÐSTEINSSON**
28 Michal **PRZYBYLSKI**
30 Marius **ÁRTING ALLANSSON**

**Venjari** Dan Brimsvík
**Hjálparvenjari** Mikkel Richardt Mortensen

## HØVUÐSSTUÐLAR HJÁ B36: